# Úr grannalondum

*Lagt til rættis: Árni Joensen*

## Danmark vil hava Norðpólin

Danmark ella rættari sagt tað danska kongaríkið fer at krevja ræðisrætt yvir fimm økjum við Føroyar og Grønland. Tað stendur í einum skjali, sum ikki er alment enn, tí tað er ikki endaliga orðað, skrivar Information.

Tað, sum hevur vakt ans, er, at økið við Norðpólin er eitt av teimum fimm, sum ríkið vil hava ræðið á, og at Danmark fer at leggja tað kravið fyri ST í seinasta lagi í 2014.

Sambært Information eru ikki serliga góð sannlíkindi fyri at finna nakað nevnivert av olju ella gassi undir pólinum. Harafturat er tað ein vansi, at dýpið er oman fyri 4.000 metrar.

## Drotningin kannar fortíðina



Fyri knappliga tíggju árum síðani skrivaðu svenskir fjølmiðlar, at týskarin Walther Sommerlath, sum var pápi Silviu drotning, fór upp í nasistaflokkin í 1934, og at hann fimm ár seinni yvirtók eina fyritøku, sum ein jødi hevði átt. Sambært fjølmiðlunum var yvirtøkan ikki heilt vanlig.

Bertil Ternert, sum er kunningarleiðari hjá svenska kongshúsinum, segði fyrradagin, at Silvia drotning er nú farin at kanna, um hald er í tíðindunum um pápan.

## Útlendingar fjølgast í Íslandi

Útlendingar tykjast hava góðan hug at búseta seg í Íslandi, samstundis sum nógv fleiri íslendingar flyta av landinum enn hinvegin. Tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í ár fluttu 640 útlendskir ríkisborgarar til Íslands, meðan 380 fluttu av landinum. Í sama tíðarbili fluttu 840 íslendskir ríkisborgarar av landinum, meðan 570 fluttu til Íslands.

Onnur hagtøl vísa, at útlendingarnir, heilir og hálvir, fjølgast skjótt í Íslandi í hesum árum. Í 1996 vóru hesi 13.262 í tali og í dag 42.230. Samanborið við fólkatalið var hesin parturin av fólkinum 5 prosent í 1996 og 13 prosent nú, og hann fer at veksa í komandi árum, sigur íslendska hagstovan.

# Deyðadømda Ashtiani kann fáa friðskjól í Íslandi



*Sakineh Mohammadi Ashtiani varð dømd til deyða í 2006 fyri at hava havt "ólógligt samband" við tveir menn*

**Í Iran er Sakineh Mohammadi Ashtiani dømd til deyða fyri hor. Nú hevur Ísland boðið henni skjól**

Tað var undir einum orðaskifti í Altinginum mánadagin um íslendskan uttanríkispolitikk, at Össur Skarphéðinsson, uttanríkisráðharri, nevndi, at hann hevur sagt iransku myndugleikunum, at Ísland er til reiðar at veita teirri deyðadømdu kvinnuni friðskjól. Hann segði tó einki um, hvat iranar siga, ella um teir yvirhøvur hava svarað.

Tað vakti stóran ans víða um heimin, tá tað frættist, at iranska dómsvaldið hevði dømt Ashtiani til deyða, og tá íslendski uttanríkisráðharrin hevði orðið á ST-aðalfundinum seinasta vetur, nýtti hann høvið til at biðja iransku myndugleikarnar geva kvinnuni grið.

Sambært altjóða tíðindastovunum er tað eitt sindur ógreitt, hvørjari støðu Ashtiani er í nú. Hon situr enn í varðhaldi, men okkurt bendir á, at deyðadómur hennara verður ikki fullførdur.

# Lækni neyðtók 12 ára gamla gentu á skurðborðinum

**Um fjúrtan dagar byrjar eitt heldur óvanligt mál í rættinum í Hamar í Noregi, har ein lækni er ákærdur fyri at hava misbrúkt sítt starv á grovan hátt**

Í Hedmark í Noregi hevur ákæruvaldið ákært ein 39 ára gamlan lækna fyri neyðtøku umframt fleiri onnur lógarbrot. Læknin, sum varð tikin seinasta heyst, hevur arbeitt á sjúkrahúsi og sum lækni í sjúkratyrlutænastuni.

Sum próvtilfar hevur ákæruvaldið millum annað sjónbandsupptøku, sum vísir, at læknin gjørdi seg kynsliga inn á eina 12 ára gamla gentu, sum lá uttan vit á skurðborðinum.



*Savnsmynd*

Harumframt er hann ákærdur fyri kynsliga niðrandi atburð ímóti fimm ungum gentum. Heima hjá læknanum fann løgreglan eisini ymiskt barnapornografiskt tilfar.

Maðurin hevur mist rættin at arbeiða sum lækni, og málið ímóti honum byrjar í rættinum í Hamar tann 30. mai.